Sosialurin ...títt vinnublað





VINNAN
VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

# Vit uppliva eina heilt nýggja ølmentan

**Tá mongu mikrobryggjaríini komu fram í Danmark, elvdi tað til, at eisini føroyingar gjørdust meiri áhugaðir í øli. Hesa avbjóðing tók Føroya Bjór upp, og er síðani komið fyri fleiri nýggjum ølsløgum. Nýggjasta ølrøðin er St. Bridget, sum verður bryggjað í fýra ymiskum sløgum, og hóast kappingin er hørð – nú kemur eisini eitt nýtt føroyskt bryggjarí á marknaðin – og fíggjarkreppa herjar, so er stjórin, Einar Waag, ikki bangin fyri kappingini. – Vit hava klárað okkum í meri enn 120 ár, so vit fara at ríða hendan stormin av eisini, sigur stjórin á Føroya Bjór**

ØLBRYGGING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Føroya Bjór hevur meiri enn 120 ár á baki, og í útvið ein triðing av hesi tíðini – smá 40 ár – hevur Einar Waag yngri verið stjóri í fyritøkuni.

Hvat heldur hann er størsta broytingin hesi árini, hann hevur verið stjóri?

- Tað eru so nógvar broytingar farnar fram hesi árini, men skal eg taka eina broyting fram um, má tað vera 1980, tá lógin varð broytt, so bryggjaríini fingu loyvi at bryggja sterkt øl. Harnæst má eg nevna 1992, tá skeinkiloyvini komu og tá Rúsdrekkasøla Landsins kom, sigur Einar Waag.

Hesar lógarbroytingar broyttu sum vera man gerandisdagin hjá Føroya Bjór.

- Undan 1980 høvdu vit bert loyvi at bryggja ljóst øl, og broytingin kom rættiliga knappliga, so vit máttu undir stórar útbyggingar beinanvegin tá, sigur Einar Waag.

Ein avleiðing av hesi broytingini var, at sølan av ljósum øli minkaði niður í nærum einki, og har hevur hon hildið sær meri ella minni øll árini.

- Tað tók sína tíð at vinna inn á marknaðin í kappingini við tað danska ølið, men tá vit koma fram móti 1990, var innflutningurin av donskum øli komin heilt niður á 10% av samlaðu søluni í Føroyum, sigur Einar Waag.

Hann sigur, at teir vóru hampiliga væl fyrireiðkaðir at fara undir brygging av sterkari øli, tí teir høvdu útbygt bryggjaríið nakað

*Framhald á næstu síðu*



*Inni á bryggjarínum eru fleiri rúm, ið virka sum museum. Millum annað sæst hendan plátan við etikettum frá farnum tíðum*

**Demich P/F Tórshavn**
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
demich@demich.fo

**Demich P/F Vágur**
Á Marknoyri
FO-900 Vágur
Telefon +298 37 35 35
demich@demich.fo

**Demich P/F Runavík**
Heiðavegur 80
FO-610 Saltangará
Telefon +298 445500
demich@demich.fo

VØLUND VARMETEKNIK




HITI • VENTILATIÓN • SANITET

Vit hava røttu loysnina til júst tín tørv.

Umhvørvisvinarlig orka við hitapumpu frá Demich

demich